FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 5. desember 2019

J.Nr.: 19/00442

Svar upp á fyrispurning nr. 23/2019 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurning frá Bjarna Hammer, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um umskipan av Strandfaraskipum landsins

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at umskipa Strandferðsluna og leggja hana í eitt alment partafelag?

2. Um so er, kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvussu hann væntar, at hetta fer at ávirka ferðafólkaflutningin og farmaflutningin hjá Strandferðsluni í framtíðini?

Svar
Eitt av fremstu málum samgongunar, er at tryggja hóskandi ferðasamband kring alt landið. Eitt væl útbygt og væl virkandi samferðslukervi hevur alstóran týdning fyri vinnuna og trivnaðin kring alt landið.

Ein møguleiki er at umskipa Strandfaraskip landsins til alment partafelag, men arbeiðir landsstýrið ikki við tí møguleikanum. Partafeløg skulu rekast á vinnuligum grundarlagi, við vinningi fyri eygað. Viðvíkjandi Strandferðsluni, so fíggja inntøkurnar minni enn helvtina av rakstrarútreiðslum stovnsins.

Strandfaraskip landsins skulu hava betri og tryggari karmar at virka eftir í framtíðini. Verða bygnaðarligar broytingar ella aðrar broytinar gjørdar, skal endamálið verða at styrkja stovnin, og at gera ferðafólka- og farmaflutning stovnsins enn betri.

Stovnurin kann í størri mun rekast á handilsligum grundarlagi, eitt nú við at endurskoða ferðaseðlaprísirnir hjá útlendskum ferðafólki, soleiðis at meira verður til rakstur. Sum kunnugt eru bygdaleiðir útveittar, og langtíðarsáttmálar gjørdir. Mykinesfarleiðin verður røkt av privatum.

Samferðslukervið er væl útbygt, og eru eini 87% av landsins borgarum knýttir saman í einum vegakervi. Tunnil verður boraður til Sandoynna, og verður nú farið undir at fyrireika arbeiðið at gera undirsjóvartunnil til Suðuroyar.

Viðmerkjast skal, at landsstýrið nú fer undir eina tilgongd at endurnýggja ferjurnar hjá Strandfaraskipum landsins.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Suðuroyggin verður tann síðsta av stóru oyggjunum, sum fær fast vegasamband, og er sera umráðandi at suðuroyarfarleiðin verður røkt á besta hátt, til fast samband verður.

Tinganes, 5. desember 2019

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum